# Fleiri fyrimunir við samanlegging

**Fyri Finnboga Ísakson, sum bæði hevur arbeitt í sjónvarpinum og útvarpinum, eins og hann hevur verið bæði løgtings- og landstýrismaður, er samanleggingin av loftmiðlunum ein gomul ætlan, sum nú verður sett í verk. Longu í 1983 hevði hann sjálvur eitt uppskot frammi um at leggja stovnarnar báðar saman**

SAMANLEGGING
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*


*Finnbogi Ísakson heldur avgjørt at fyrimunirnir við samanlegging eru fleiri enn vansarnir, serliga innanfyri tað umsitingarliga. Sjálvur hevði hann uppskot frammi í 1983 um at samanleggja stovnarnar*

Finnbogi Ísakson heldur tað vera eitt framstig at leggja loftmiðlarnar saman. – Eg vænti, at tað fæst meiri burturúr um stovnarnir verða lagdir saman, heldur hann. – Hetta er ein sera góður háttur at effektivisera stovnarnar, og eg vænti, at fyrimunirnir við samanleggingini verða fleiri enn vansarnir.

Finnbogi nevnir, at møguleikarnir gerast nógv fleiri tá ið umsitingin gerst felags. Um stovnarnir fara at duga at útnytta felags umsitingina, verða fleiri fyrimunir fyri báðar stovnar. T.d. kunnu starvsfólkini skifta ímillum arbeiðsplássini, soleiðis, at tey halda á at mennast og at fáa íblástur. – Eg eri greiður um, at sendiflatan hjá útvarpinum og sjónvarpinum ikki er tann sama, men har eru nakrar ógvuliga stórar umsitingarligar líkheitir. Tí hevði ein felags umsiting verið ein stór effektivisering, heldur hann.

Finnbogi nevnir víðari, at útvarpshúsið varð bygt við tí fyri eygað, at sjónvarpið eisini skuldi koma at húsast har. T.d. var útvarpshøllin ætlað til sjónvarpsframleiðslu. Tað hevur tó ikki verið serliga aktuelt higartil. – Vit síggja tað í útlondunum, bæði í Danmark, Noregi og aðrastaðni, at miðlar verða lagdir saman við sera góðum úrslitum. Hví skuldu vit ikki kunna gjørt tað her eisini, spyr Finnbogi.

Hann nevnir, at ein samanlegging fer at lata nakrar hurðar upp, tá ið tað kemur til at talgilda útgerðina hjá sjónvarpinum, eins og hon longu er tað hjá útvarpinum.

### Verjið kappingina

Finnbogi Ísakson leggur tó eisini dent á, at tað kann fara at verða ein trupul uppgáva, at fáa stovnarnar at fungera undir eini leiðslu. Tað eru altíð vansar við eini samanlegging, men Finnbogi væntar tó, at teir fara at finna ein lykil til trupulleikarnar. – Tað er týdningarmikið fyri kappingina, at teir framvegis fara at varðveita tvær sjálvstøðugur redaktiónir. Ein ávís kapping má vera, og tí mugu teir eisini leggja dent á at hava tvær deildir, sigur hann.

Víðari heldur hann, at vánaliga fíggjarstøðan hjá svf kann fara at verða ein bági, tá stovnarnir verða lagdir saman. Tað er ein vandi fyri, at SvF fer at eta frá ÚF, men Finnbogi roknar tó ikki við, at umsitingin fer at lata tað henda. Teir mugu finna eina fíggjarætlan, sum fyribyrgir at vánaliga støðan í Svf koppar ÚF.

Spurdur um framferðarháttin hjá landsstýrismanninum í málinum, hevur Finnbogi Ísakson lítlar og ongar viðmerkingar. – Eg kann siga, at eg taki undir við prinsippinum um samanlegging. Hvat landsstýrismaðurin hevur gjørt havi eg sum so onga viðmerking til. Men eg gangi út frá, at hann man hava sínar orsøkir til at gera júst soleiðis. Hann hevur jú ikki tikið eina avgerð, sum verður sett í verk frá einum degi til annan. Hann hevur tikið eina avgerð, sum verður sett í verk um eitt hálvt ár, so tað er enn nakað av tíð, har partarnir kunnu tosa saman og finna útav hvat er rætt at gera, staðfestir Finnbogi Ísakson. Avgerðina hjá landsstýrismanninum um at seta útvarpsstjóran sum stjóra í báðum stovnunum, heldur Finnbogi vera í lagi. – Jógvan Jespersen hevur verið útvarpsstjóri í 14 ár, og hann er komin sera væl frá tí. Mikkjal Helmsdal er nógv nýggjari í stjórasessinum. Eg haldi tað vera rímiligt at seta hann, sum hevur verið longri í starvi til stjóra yvir báðum stovnunum, sigur Finnbogi Ísakson at enda.

Sjónvarpsstjórin:

# Skeiv avgerð at sløkkja í vikuskiftinum

**Mikkjal Helmsdal stjóri í Svf sigur við Sosialin, at avgerðin um at sløkkja fyri SvF í vikuskiftinum var skeiv. – Tað var skeivt at taka hyggjaran til gísla, sigur hann**

SAMANLEGGING
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*






*Mikkjal Helmsdal sjónvarpsstjóri bleiv tikin av ræði leygardagin. Starvsmannafelagið gjørdi av at svartleggja skermin hóast Mikkjal Helmsdal ikki helt tað vera rætt*

Um vikuskiftið hevur nógv knarr verið at hoyra frá ónøgdum sjónvarpshyggjarum. Serliga teimum, ið enn ikki hava ognað sær parabol, og sum tí bert síggja føroyingin. Seinastu tíðina hevur føroyska sjónvarpið verið fyri hørðum ákoyringum, so tað er sum so ikki nakað nýtt í tí. Hesuferð var orsøkin til stóru misnøgdina tó ikki vánaligt, útlendskt tilfar ella endursendingar, tí einki varð víst yvirhøvur.

Mikkjal Helmsdal sjónvarpsstjóri skilir væl, at fólk eru ónøgd og hann heldur sjálvur, at avgerðin um at gevast at senda var skeiv. Hann hevði tó onga ávirkan á tað sjálvur.

### Starvsmannafelagið sløkti

Tá ið boðini komu frá landsstýrismanninum, um at sjónvarpið og útvarpið skuldu leggjast saman, gekk ikki long tíð fyrr enn starvsmannafelagið eisini kom upp í leikin. Teir avgjørdu, at Svf ikki skuldu senda um vikuskiftið. Mikkjal Helmsdal, stjóri, sigur, at hann hevði fund við starvsfólki hjá sær leygarmorgunin, har tosað varð um, hvørt tey skuldu senda í vikuskiftinum ella ikki. Sjálvur helt hann, at tað var skeivt ikki at senda. Mikkjal sigur tó, at eftir at starvsfólki hevði verið á fundi við starvsmannafelagið varð avgerð tikin um ikki at senda.

– Hetta var ein provokatión frá starvsmannafelagnum og tað eru tiltøk frá teimum, sum hava lagt skermin svartan alt vikuskiftið. Hetta var ikki ein avgerð hjá stovninum, og hetta er heldur ikki ein avgerð eg stuðli. Eg haldi ikki, at tað var rætt at taka hyggjaran til gísla alt vikuskiftið, fyri at gera vart við sína ónøgd mótvegis landstýrinum, sigur ein ógvuliga avgjørdur Mikkjal Helmsdal. Hann metir ikki at hyggjarin skal blandast inn í hetta málið.

Spurdur um hetta málið ikki er blivið til ein hanakamp, har allir partar royna at vera raskastir at provokera hinar, sigur Mikkjal Helmsdal seg onga viðmerking hava til. Hann hevur tó ofta verið lagdur undir at provokera, serliga við seinastu ætlanunum, um at samsenda við eina danska rás. Í løtuni tykist støðan hjá sjónvarpsstjóranum vera sera ógreið. Greitt er tó, at við at sløkkja skermin í vikuskiftinum, gekk starvsmannafelagið beinleiðis ímóti stjóranum í svf.



Árni Gregersen:

# Varðveitið tvær sjálvstøðugar redaktiónir

**– Vandin við eini samanlegging av ÚF og SVF er, at vit fáa ein ov einstáttaðan tíðindaflutning uttan kapping. Stovnurin kann við hesum gerast ov sterkur og hava ov lætt við at stýra politiskt, sigur fyrrverandi sjónvarpsstjórin Árni Gregersen. Hann sigur seg tó skilja avgerðina hjá landsstýrismanninum, sum SVF stjórin sjálvur hevur framprovokerað**

SAMANLEGGING
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*



*- Við tað at føroysku bløðini framvegis eru politisk, er tað grundleggjandi neyðugt, at almennu loftmiðlarnir varðveita tað sindrið av fjøltáttaðum tíðindatilfari, sum enn er í Føroyum, og tí eiga tíðindaredaktiónirnar at arbeiða hvør sær, sigur Árni Gregersen, fyrrverandi sjónvarpsstjóri*

Niðri á Bornholm situr fyrrverandi sjónvarpsstjórin Árni Gregersen og fylgir væl við, hvussu eftirkomarar hansara hava tað í føroyska fjølmiðlaheiminum. Bumban hjá Jógvani á Lakjuni mentamálaráðharra fríggjamorgunin kom eisini dátt við hjá Árna Gregersen, men hóast hann prinsipielt er ímóti eini samanlegging, sigur hann seg skilja avgerðina orsakað av støðuni, SVF eftirhondini er komið í.

### Mikkjal provokeraði

– Tað tykist, sum SVF er komið í eina ónda ringrás, har einki kann lata seg gera. Stovnurin hevur hóast alt fingið meiri pening frá politiska myndugleikanum og hevur nú 32 milliónir at arbeiða við, men kortini verður minni sjónvarpstilfar framleitt. Ta sannroynd má politiski myndugleikin fyrihalda seg til, sigur Árni Gregersen.

Hann heldur, at núverandi sjónvarpsstjórin Mikkjal Helmsdal í ein mun sjálvur hevur framprovokerað avgerðina, tí hann á sinni valdi bert at senda føroyskt tilfar frá 18-21 og annars samsenda við Danmark Radio. Tí er samanleggingin ein avgerð, Árni í ein mun hevði væntað.

– SVF tykist ikki verða ført fyri at koma burturúr æviga kjakinum um meiri pening, og drastisku avgerðirnar hjá stjóranum hava avgjørt havt sína ávirkan, sigur Árni.

### Horvin kapping

Men Árni Gregersen óttast eisini avleiðingarnar av eini samanlegging, og fyrst og fremst eru vandarnir á tíðindaøkinum. Sambært Árna kann kappingin at framleiða tíðindi nú hvørva, og tað er í sær sjálvum sera álvarsamt.

Árni Gregersen ávarar, at føroyingar nú fáa eina einstaka felags redaktión ella ov tætt samstarv millum redaktiónirnar, har tíðindaflutningurin kann gerast ov einstáttaður. Felags stovnurin kann sambært Árna Gregersen nú eisini gerast ov sterkur og hava ov lætt við at stýra politiskt.

– Tí vil eg harðliga mæla til, at tvær sjálvstøðugar redaktiónir framhaldandi verða varðveittar, so kappingin og fjølbroytnið ikki hvørvur. Umframt hetta er tað alneyðugt, at tíðindi og annað tilfar verður tikið upp og viðgjørt á tveimum støðum, sum ikki hava samband við hvørt annað, tí annars kunnu áðurnevndu vandar gera seg galdandi, sigur Árni Gregersen.

Fyrrverandi sjónvarpsstjórin heldur, at føroyski tíðindastreymurin longu nú er alt ov einstáttaður, og tí vónar hann, at redaktiónirnar verða skildar at og áhaldandi vera í kapping.

– Við tað at føroysku bløðini framvegis eru politisk, er tað grundleggjandi neyðugt, at almennu loftmiðlarnir varðveita tað sindrið av fjøltáttaðum tíðindatilfari, sum enn er í Føroyum, sigur Árni Gregersen. Boðskapurin hjá Árna er tí greiður: Varðveitið tvær sjálvstøðugar tíðindaredaktiónir.

Í tíðindaskrivinum frá Mentamálaráðnum fríggjadagin stóð í hesum sambandi soleiðis: »Sostatt fáa vit ein sterkan almennan public service stovn, ið tó av givnum grundum eigur at hava tvey sjálvstøðug og óheft redaktiónsumhvørvi«.

Við hesum í huga bendir nógv á, at ynskini hjá Árna Gregersen verða praktiserað, og at broytingarnar ikki verða tær stóru fyri hyggjaran og lurtaran.

### Samstarv

Men hóast Árni Gregersen mælir til ikki at leggja tíðindaredaktiónirnar saman, varpar hann samstundis ljós á samstarvsmøguleikar millum sjónvarps- og útvarpsfólk.

– Í einum og sama stovni kunnu og eiga starvsfólk sjálvsagt at arbeiða saman, og tað gjørdu vit eisini í síni tíð, hóast vit ikki arbeiddu á sama stovni. Tað hendi meiri enn so, at vit í SVF syrgdu fyri myndum, meðan starvsfólk í útvarpinum tóku sær av ljóði, minnist Árni Gregersen aftur.

Hann heldur, at líknandi samstarv millum útvarp og sjónvarp er náttúrligt, serliga tá farið verður undir størri og meiri grundleggjandi verkætlanir. Men Árni Gregersen undirstrikar, at um fjølbroytni skal vera í føroyska tíðindaheiminum, er kapping ein treyt, og tá má talan vera um tvær sjálvstøðugar redaktiónir.

### Administrativir fyrimunir

Meðan Árni og onnur við óttast, at tíðindaredaktiónirnar verða lagdar saman ella vera í ov tøttum samstarvi – sum í botn og grund kann gerast ein hóttan fyri fólkaræðið – metir Árni Gregersen, at fyrimunirnir við samanleggingini eru administrativir.

– Sum Jógvan á Lakjuni hevur víst á, eru fyrimunirnir við eini samanlegging rationaliseringar og sparingar í umsitingini. Hesar grundgevingar meti eg vera møguligar at realisera, men mín vón er sum áður nevnt, at samanleggingin ikki ávirkar tíðindaredaktiónirnar, sigur fyrrverandi sjónvarpsstjórin Árni Gregersen at enda.

# Framtíðin hjá Mikkjali er ógreið

**Sjónvarpsstjórin Mikkjal Helmsdal heldur, at avgerðin um at samanleggja ÚF og SVF er tikin uttan neyðugu fyrireikingarnar, og hann kann framvegis einki siga um, hvør leiklutur hansara verður eftir samanleggingina**

SAMANLEGGING
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Eingin veit, hvør leikluturin verður hjá núverandi sjónvarpsstjóranum Mikkjali Helmsdal undir og eftir samanleggingina av ÚF og SVF. Og nógv bendir á, at Mikkjal ikki sjálvur veit, hvar á talvborðinum hann er staddur.

– Eg kann ikki siga nakað um, hvør framtíðin hjá mær verður, og í løtuni bíði eg eftir nærri upplýsingum frá avvarðandi myndugleikum. Eg umhugsi støðuna sum heild, og meiri kann eg ikki siga, eru viðmerkingarnar hjá Mikkjali Helmsdal.

Sjónvarpsstjórin hevur onga uppsøgn fingið, og tí kann væntast, at hann framvegis verður ein partur av føroyska loftmiðlaheiminum eftir nýggjár, men enn er einki greitt hesum viðvíkjandi.

### Ov skjót avgerð

Mikkjal Helmsdal finnist annars at mentamálaráðharranum fyri framferðarhátt hansara. Sjónvarpsstjórin heldur, at avgerðin er tikin uttan neyðugu fyrireikingarnar.

– Jógvan á Lakjuni hevur tikið avgerðina uttan neyðugu analysuna. Hann hevur hvørki ráð-ført seg ella verið í samráð við avvarðandi stovnar, og hann hevur ikki tikið sakkunnleikan við uppá ráð, sigur sjónvarpsstjórin.

### DR og bygnaðarbroytingar

Tá Sosialurin hevði Mikkjal Helmsdal á tráðnum mánadagin fyrrapart, vóru annars nógvir spurningar, hann ikki kundi gera viðmerkingar til. Í leygardagsblaðnum segði sjónvarpsstjórin, at ætlaðu bygnaðarbroytingarnar í SVF ikki verða framdar, og at ætlanirnar at samsenda við DR verða lagdar á hillina.

Mikkjal Helmsdal vil í dag ikki gera viðmerkingar til tey málini, men alt bendir á, at samanleggingin hevur fyribils forða teimum ætlanunum at verða stungnar út í kortið.